Smoltstøðin er latin aftur:

# Mønustingur fyri Svínoyarbygd

**Nú alt smoltið á smoltstøðini í Svínoy er dripið, er bert eitt fjórðings arbeiðspláss eftir á posthúsinum í bygdini og maðurin, ið tekur ímóti Másanum, hevur eisini ruskið hjá IRF, sum svarar til eitt fulltíðarstarv tilsamans. Skúlin er stongdur, og einasta barnið í bygdini, sum er undir skúlaaldur, er tvey ára gamalt**



*Svínoy er ein doyggjandi bygd. Nú eru arbeiðsplássini, sum vóru á smoltstøðini, burtur, og skúlin er stongdur, tí einki barn er í skúlaaldri*

SVÍNOY
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er illa vorðið í Svínoy, nú smoltstøðin, sum hevur verið ein týðandi partur av inntøkugrundarlagnum undir bygdini, læt aftur seinasta fríggjadag. Alt smoltið, sum var á støðini, er dripið, og neyvan veit nakar at siga, um smoltaling nakrantíð aftur verður í Svínoy.

Fleiri smoltstøðir, sum vóru í smáu bygdunum kring landið, er nú stongdar, og miljónir av smoltum eru avlívað og verða avlívað í næstum. Størsta bygdarmenningartiltak í nýggjari tíð er við at fara í søguna – í hvussu er fyribils…

## Bygdin doyr út

Poul Sundsskarð, bygdarráðsformaður í Svínoy, sigur, at nú sær ógvuliga svart út hjá bygdini, og hann stúrur fyri, at hetta verður mønustingurin.

– Tá ið mest var at gera á smoltstøðini, vóru eini 6-8 ársverk knýtt at henni, og hann heldur, at hesi arbeiðsplássini vóru eini 30% av skattainntøkuni hjá Svínoyar kommunu.

Hann sigur, at skattainntøkan hjá kommununi liggur um 940.000 krónur um árið, og av hesum plagar kommunan at betala einar 300.000-400.000 krónur útaftur í lønum til ymisk kommunal arbeiði, eitt nú viðlíkahald og kloakkir.

– Nú broytist alt og vit, sum sita í bygdarráðnum, noyðast at hyggja uppá fíggjarætlanina av nýggjum, tá ið fyrsta fjórðingsár er farið afturum. Vit vænta eitt stórt fall í skattainntøkunum í ár.

Poul ásannar, at smoltstøðin í Svínoy líka sum hevur koyrt í tómgongd seinasta hálva árið, men støðin hevur verið ein dyggur stuðul, tá ið alt var, sum tað plagdi at vera.

Hann heldur, at einir fýra mans vóru knýttir at støðini nú uppundir endan.

– Tað hevur verið soleiðis, at teir, sum arbeiddu á smoltstøðini, búðu og rindaðu sín skatt í bygdini. Tí hevur støðin havt so ómetaliga stóran týdning fyri trivnaðin í kommununi.

## Ein lagnudagur

Bygdarráðsformaðurin sigur, at nú smoltstøðin er latin aftur, og fiskurin er dripin, eru bert tvey arbeiðspláss eftir í bygdini.

– Á posthúsinum er eitt fjórðingstíðarstarv og maðurin, sum tekur ímóti postbátinum, hevur eisini ruskinnsavningina hjá IRF, sum er eitt fulltíðarstarv tilsamans.

Poul sigur, at ein bóndi er eisini í bygdini, og onkur annar hevur okkurt minni festi, sum hvørki er at liva ella doyggja av.

– Jú, fríggjadagurin, 13. februar, var av sonnum ein lagnudagur fyri Svínoyarbygd, sigur ein harmur bygdarráðsformaður.

Hann væntar ikki, at smoltstøðin í bygdini verður latin uppaftur í bræði, tá ið hon fyrst er afturlatin.

– Tá - og um - tann tíðin kemur, at smoltstøðir, sum nú eru stongdar, verða latnar uppaftur, er neyvan hugsandi, at smoltstøðirnar á útoyggj verða tær, ið lata fyrst uppaftur. Tað verða helst tær, sum eru inni á fastlandinum, sigur ein dapurskygdur Poul Sundsskarð.

## Eingin skúli

Barnaskúlin í Svínoy læt aftur eftir heystfrítíðina, tá ið familjan, sum hevði børn í skúlaaldri, flutti av bygdini.

Bygdarráðsformaðurin sigur, at eitt barn er undir skúlaaldur í bygdini, og tað er bert tvey ára gamalt. Tískil ganga helst fleiri ár, áðrenn nakar skúli verður aftur í Svínoy, um ikki fólk, sum eiga børn, flyta útaftur í oynna at búgva.

– Eg havi skilt, at í sínari tíð, tá ið bygdin var frægast fyri við fólki, vóru eini 50 skúlabørn í Svínoy.

Poul sigur, at einir 10 mans í vinnuførum aldri, hava einki lønandi arbeiði at takast við, tí einki er til teirra í bygdini.

Eini 20-25 fólk búgva fast í Svinoy, men talið av teimum, sum eru skásett í kommununi, er 58.

– Eg trúgvi, at eini 40-45% av skattainntøkuni hjá kommuni kemur frá fólki, sum eru skrásett í Svínoy, men sum búgva og arbeiða aðrastaðni.

Eingin fiskimaður er eftir, men onkur er, sum rør út við útróðrarbátum aðrastaðni.

– Tað vísti seg eftir kreppuna, at menn, sum sigldu við ymiskum skipum, ikki fóru umborð aftur, men valdu heldur at leggja seg uppá land at arbeiða. Um hetta mundið var eitt nú arbeiði í Svínoy við at byggja bátahylin.

## Eingin útróður

Vit spurdu eisini Poul, um útróður úr Svínoy kundi verið ein inntøkukelda hjá svínoyingum, men hann heldur ikki, at møguleikarnir eru nakað serligir, tí bátahylurin roynist ikki, tá ið nakað sum helst er í sjónum.

– Einastu, sum hava nyttu av bátahylinum, eru avbygdarfólk, sum leita út higar um sumrarnar.

Hann sigur, at ringastu ættirnar eru eystan og landsynningur.

– Tú ert ongantíð tryggur, um tú hevur bátin liggjandi í hylinum, og tí roynist hylurin ikki sum útróðrarhavn, um so skuldi verið, sigur Poul.

## Ferðasambandið

Ferðasambandið, sum svínoyingar hava, er avgjørt heldur ikki við til at stimbra trivnaðin í bygdini.

– Tað er bert tveir dagar um vikuna, at Másin siglir tvær ferðir, soleiðis at sleppast kann í millum við skipinum, nevniliga mánadag og fríggjadag. Tað halda vit vera alt ov lítið. Minsta kravið hjá okkum er, at báturin siglir minst tvær ferðir um dagin alla vikuna.

Poul sigur tó, at tyrluflúgvingin, sum er supplerandi mikudag, fríggjadag og sunnudag, ger góðan mun.

– Men vit hava eitt brennandi ynski um, at Másin skal sigla í minsta lagi tvær ferðir um dagin.

Poul Sundsskarð er ikki svínoyingur sjálvur, hóast hann er formaður í Svínoyar kommunu.

– Eg eri klaksvíkingur og hálvur hvannasundsmaður.

Hann keypti sær í sínari tíð eini gomul hús úti í Svínoy, sum hann setti í stand. Poul gjørdist hugtikin av bygdini, fólkinum og náttúruni og varð skrásettur sum borgari har úti fyrst í nítiárunum.

– Á seinasta kommunuvali vildu fólk hava meg – ímóti mínum vilja - at stilla upp til bygdarráðsvalið, og eg varð valdur. Síðan havi eg verið bygdarráðsformaður í Svínoy, sigur Poul Sundsskarð at enda.



*Onkuntíð var lív í skúlanum í Svínoy, men tað er tað ikki í dag. Nú er øskukalt og eingi skúlabørn. Einasta barn í Svínoy í dag, sum er undir skúlaaldur, er bert tvey ára gamalt*



# Pressan er hjartaleys

**Leila Solmunde av Kambsdali misti son sín í ferðsluvanlukku fyri hálvumtriðja ári síðani. Hon hevur harðliga at fjølmiðlunum fyri at válka sær í orsøkum til vanlukkurnar og skapa kjak um viðurskifti, sum kunnu fáa avvarðandi at hugsa um hvat kundi havt hent og ikki – heldur enn at varpa meiri ljós á tað fyribyrgjandi arbeiðið**

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Tað er hjartaleyst av fjølmiðlunum at varpa ferðsluvanlukkur út um allar geilar so stutt eftir at tær eru hendar*

Síðani ferðsluvanlukkuna við Áir tann 11. februar í ár, har ein ung kvinna lat lív, hevur nógv verið gjørt burtur úr í fjølmiðlunum. Fjølmiðlarnir vóru skjótir úti við tíðindunum um, at vanlukkan hevði kravt eitt mannalív, síðani komu spurnartekin um, hvørs rætta mannagongd varð fylgd í hesum málinum og nú er tað spurningurin hvør hevur ábyrgdina av málsøkinum.

Alt hetta eru evni, sum eru áhugaverd at taka upp í fjølmiðlunum, men spurningurin er, hvat tað ger við tey avvarðandi og onnur, sum hava mist í ferðsluni.

Sosialurin hevur tosað við Leilu Solmunde av Kambsdali, sum misti einasta son sín í ferðsluvanlukku á sumri í 2001.

– Foreldur, sum hava mist í ferðsluni, verða mint á teirra egnu sorg, tá ferðsluvanlukkur verða penslaðar út í fjølmiðlunum, soleiðis sum tann vanlukkan, sum júst er hend, sigur Leila Solmunde.

Hon heldur, at ljós heldur átti at verðið varpað á meiri fyribyrgjandi upplýsningar fram um møgulig mistøk ella hvat kundi havt hent í sambandi við vanlukkuna.

– Tað er smagleyst av fjølmiðlunum at geva teimum avvarðandi eina fatan av, at um tað og tað var gjørt, so hevði útslagið kunnað verið øðrvísi, sigur Leila.

Hon nevnir sum dømi, tá Útvarp Føroya á middegi hósdagin í farnu viku kom við søguni um, at tað var eitt ivamál, um Alarmsentralurin hevði fylgt rættari mannagongd.

– Eg fekk næstan vaml, tá eg hoyrdi útvarpið, tí ikki einans leita tankarnir til tey, ið eftir sita eftir kvinnuna, men eisini rippar tað alt uppaftur í eins egnu sárum, greiðir hon frá.

Hon heldur somuleiðis, at tað verður pensláð so nógv út í útvarpinum við, at somu tíðindi eru at hoyra fleiri ferðir um dagin um tað sama í fleiri dagar.

– Ein fer at hugsa um, alt nú mundi verið gjørt fyri mítt barn, tá hann lat lív. Ein rúgva av spurningum, sum ongantíð verða svaraðir, sigur Leila, sum heldur ikki heldur nógv um forsíðumyndina á Sosialinum vanlukkudagin, har bilurin var á.

– Tað er hjartaleyst, og tað verður als ikki hugsað um tey avvarðandi ella onnur, sum hava mist í slíkum førum, sigur Leila.

## Rakar øll

Leila Solmunde leggur dent á, at tá ein ferðsluvanlukka hendir, so er tað ikki bara tey avvarðandi, sum verða rakt. Hon sigur, at slíkar vanlukkur raka øll, sum hava mist í ferðsluni.

Hon fer aftur at tosa um myndina á forsíðuni á Sosialinum. Hon sigur, at hon veit, hvat ein mamma, sum hevur mist skal ígjøgnum. Og síðani at síggja eina mynd sum hasa, so kann hon bert ímynda sær, hvørjir tankar munnu fara í gjøgnum høvdið á teimum allarnærmastu.

– Eg eri so glað fyri, at eg ongantíð sá mín bil, tí um hatta hevði verið mín, so hevði eg so avgjørt ikki havt tað gott, um eg sá hann á forsíðuni á einum blaði, sigur Leila og leggur afturat, at hon skilir ikki, at bløð skulu selja, tí at hon misti sín son.

– Eg veit, at slíkt ofta verður nýtt til at ræða ung við. Og tað dugi eg eisini væl at síggja, men tað altso ikki altíð, at slíkt gevur tað virkan, sum ynskiligt var, sigur Leila Solmunde.

## Hvar er endamálið

Leila spyr, hvat endamálið er við at ein vanlukka verður varpað út um allar geilar so stutt aftan á, at hon er hend.

– Hendan kvinnan letur lív á landsvegnum um hálvgum níggjutíðina um morgunin, og á middegi er tað longu á netinum. Hvørjum endamáli tænir tað, spyr Leila og leggur afturat, at tað óivað er ein spurningur um, øll tey avvarðandi hava fingið deyðsboðini so skjótt aftaná.

Leila skilir tó væl, at slíkt skal út í fjølmiðlarnar, men hon fílist á handfaringina, sum hon heldur er farin púra av kós.

– Ein samrøða við Ráðið fyri Ferðslutrygd hevði verið meira passandi í einum slíkum føri, heldur enn eitt óhugnaligt kjak um mannagongdir, sum verða fylgdar ella ikki, sigur hon.

Leila Solmunde eftirlýsir, at fjølmiðlar spyrja Ráðið fyri Ferðslutrygd, tá slíkar vanlukkur henda. Eisini heldur hon, at partarnir, sum hava við slíkar vanlukkur og bjargingararbeiði at gera, áttu at sett seg niður til samráðingar og kjakast.

– Eitt tílíkt kjak hoyrir so avgjørt ikki heima í fjølmiðlunum, og tað tænir heldur ongum endamáli, sigur Leila Solmunde.



*Ljós átti heldur at verðið varpað á kjak um ferðslutrygd, enn mannagongdir, mistøk og annað, heldur Leila Solmunde, sum misti son sín fyri hálvumtriðja ári síðani*

# Kjak skal til

**Jón Kragesteen, leiðari á Ráðnum fyri Ferðslutrygd, sigur, at kjakið um ferðslutrygd skal til. Men hann harmast um, at tað bert er, tá vanlukkur henda**

FERÐSLUTRYGD
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Kjakið um rættar mannagongdir og ferðslutrygd, sum heild, sum ofta kemur í kjalarvørrinum av eini ferðsluvanlukku, skal til, heldur leiðarin fyri Ferðslutrygd, Jón Kragesteen.

Men hann skilur samstundis væl, at tað eru summi, sum kenna seg stoytt av stórum myndum av bilvrakum og kjakinum um mannagongdir og annað.

Jón sigur seg í prinsippinum onki hava ímóti kjakinum, men hann harmast um, at tað bert er, tá ein vanlukka er hend og so nakrar dagar eftir tað.

– Einar tveir tríggjar dagar, so er kjakið burturaftur inntil næstu ferð. Tað er harmiligt, sigur Jón.

Kjakið átti at verið frammi allatíðina heldur hann, so at tað fyribyrgjandi arbeiðið verður fylgt upp allatíðina.

Jón trýr uppá, at kjak og myndir og so framvegis hevur eina ávísa fyribyrgjandi megi, men hann dugir kortini væl at síggja hvørja ávirkan tað hevur á tey, sum hava mist.

– Tað stutta av tí langa er, at eg haldi, at lív skal haldast í hasum kjakinum, soleiðis at tað ikki bara blussar upp, tá ein ferðsluvanlukka hendir, og so er vekk aftur eftir fáum døgum, sigur Jón Kragesteen, leiðari fyri Ferðslutrygd.